Ferðast við fólki til heimsins botn

Hesi síðstu árini hevur Klaus Kiesewetter ferðast í eini heilt aðrari verð, har tey villu dýrini ikki ræðast fólk og har minnisvarðar um menniskjans ágang ímóti natúruni enn eru sjónligir

FERÐAFRÁSØGN
Áki Bertholdsen

– Hetta er ein heilt onnur verð. Men tann, sum vil sleppa at uppliva hana, skal ikki vera fátækur.

Síðani Klaus Kiesewetter flutti úr Føroyum fyri trimum árum síðani, hevur hann ferðast í eini heilt aðrari verð, sum tað bert er teimum heilt fáu beskorið at uppliva.

Hann siglir við ferðamannaskipum, sum gera útferðir til heimsins botn, Antarktisk.

Týski Klaus Kiesewetter hevur búð í Føroyum í onnur jørn í eldinum.

Hann sigur, at arbeiðið, hann nú hevur, letur heilt aðrar dyr upp til ein heim, sum fá sleppa at síggja.

Í løtuni er hann í Føroyum og roynir at geva føroyingum innlit í hendan sermerkta heimin. Tað ger hann bæði við fyrilestrum og við myndum frá teimum upplivilsum, hann hevur havt.

Hóskvøldið hevði hann fyrilestur í Stóra Pakkhúsi í Vági, har hann við orðum og myndum greiddi frá tí stóru ísverðini fyri sunnan. Leygardagin hevur hann fyrilestur í Norðurlandahúsinum í Havn. Sama dag letur eisini ein myndaframsýning upp við myndum frá ferðum hansara, framsýningin hongur uppi í ein mánað.

Ferðir fyri ríkfólk

Klaus Kiesewetter hevur serliga siglt við teimum skipum, Bremen og Hansatic, ið bæði eisini hava verið í Føroyum.

Umborð er arbeiðið hansara at halda søguligar fyrilestrar fyri ferðafólki um um Antarktisk og tey stoð, har skipið leggur at á ferðunum.

Ferðirnar vara vanliga ímillum 17-25 dagar, men tær kosta minst 70.000 krónur, umframt ferðina til yvir til Suðurargentina, har sjálv sjóferðin yvir um hav byrjar.

– So tað er ikki vanlig fólk, vit ferðast við. Tað eru ríkfólk úr USA, Evropa og úr Asia, mest Japan, sum eru á hesum ferðunum, sigur Klaus.

– Men hetta eru fólk, sum hava sæð tað mesta av heiminum og eru sinnað at betala, tað sum tað kostar at síggja ein blett av jørðini, sum ógvuliga fá hava sæð áður.

Ferðin, suður til Antarktisk varar vanliga hálvtannað til tvey samdøgur og er mangan baldrut, tí hetta er ein leið har látrýst eftir látrýst ofta føra nógvan vind og sjaskveður við sær. Men komin suðurum, er veðrið gott.

Hann sigur, at á ferðini verður lagt at ymsastaðni, eitt nú á gomlum hvalastøðum og øðrum søguligum støðum.

– Hetta er ein heilt onnur verð, enn tað, vit eru von við. Djóralívið er sera fjølbroytt og ógvuliga sermerkt við tað, at dýrini ræðast ikki fólk.

– Tvørturímóti eru dýrini rættiliga forvitin. Ístaðin fyri at renna undan, plaga pingvinirnir at gøgast upp á fólk, nippa í buksubrøkurnar og bíta í lissurnar í skónum fyri at vita, hvat hetta er fyri eitt slag, sum er komið framvið.

– Tað ýðjur eisini í kópum, men teir tíma ikki at hyggja upp, hóast fólk koma teimum so nær um eina armslongd.

Hann sigur, at hetta kemst av, at dýrini ongar natúrligar figgindar hava og tí hava tey onki at vera bangin fyri.

Fyrilesturin í Norðurlandahúsinum leygardagin, verður tann einasti, sum Klaus Kiesewetter hevur í Føroyum á hesum sinni.

Í einum seinni blað fara vit at hava samrøðu við Klaus Kiesewetter um ferðir hansara til heimsins botn.

Ein ógvuliga forvitin pingvinungi forvitnast at vita, hvat Klaus Kiesewetter er fyri ein. Myndin er tikin í Suðurgeorgia, ið er ein oyggj eystanfyri Hornið í Suðuramerika. Á ferðini suður í Antarktisk plaga ferðamannaskipini at leggja at landi í Suðurgeorgia

Skil fáast á bíðilistan til barnaansing í Havn

Nú skulu púra greiðar reglar gerast fyri, hvussu børn í Havn verða tikin upp í dagrøktina. Heðin Mortensen sigur, at hereftir skal ongin ivi verða um, hvar á bíðilistanum eitt barn stendur

BÍÐILISTI
Áki Bertholdsen

Bíðilistin til at fáa dagstovnapláss til børn í Havnini hevur mangan elvt til misnøgd og trupulleikar.

Men tað skal broytast, tí nú skulu heilt greiðar reglar gerast fyri, hvussu børnini verða tikin inn á dagstovnar, ella í dagrøkt.

Tórshavnar Býráð hevur nú gjørt eina greiða reglugerð fyri, hvussu børnini skulu takast í ansing og mentamálnevndin hjá býráðnum hevur einmælt samtykt at taka undir við reglugerðini og hevur mælt býráðnum til at seta hana í verk.

Heðin Mortensen sigur, at eftir nýggju reglugerðini skulu foreldur ongantíð ivast í, hvar á bíðilista teirra barn stendur.

Sostatt verður ikki longur gingið eftir at kynsbýtið á stovnunum skal passa. Higartil hevur tað verið so, at børn eru koyrd afturum á bíðilista og onnur børn tikin framum, tí tey hava hóskað betri til aldursbýtið á stovninum, har tey eru tikin inn.

Nú er einasta treyt, at minst tvey børn av sama kyni skulu vera á somu stovu, hetta fyri at tey skulu hava onkran av sama kyni at spæla við.

Annars skal ein upptøkunevnd setast við trimum umboðum, sum skulu handfara hvørja einastu umsókn. Í henni koma at sita dagligi leiðarin fyri dagrøktina, Katrin Petersen, eitt umboð fyri dagrøktina og eitt umboð fyri dagstovnarnar.

Heðin Mortensen sigur, at tá ið foreldur søkja um at fáa eitt barn í ansing, skal barnið hava eitt nummar, alt eftir, hvar á bíðilistanum, tað stendur. Tey skulu eisini hava at vita, nær væntandi er, at barnið sleppur inn.

– Síðani skal tað altíð bera til hjá foreldrunum a fylgja við, hvar barnið stendur á bíðilistanum, Tey, sum hava atgongd til alnetið, kunnu gera tað har.

– Tá ið foreldur søkja, kunnu tey raðfesta, hvørjum stovni, tey vilja hava børnini á. Tey, sum bara skriva eitt navn, koma bara upp á tal til tann eina stovnin og hava tískil ongan møguleika at fáa børnini á annan stovn. Men tey, sum fáa børnini á stovnin, tey hava raðfest sum munnar tvey, ella trý, kunnu søkja um at fáa børnini á stovnin, tey hava raðfest sum nummar eitt og so fáa tey tað, tá ið pláss er, sigur Heðin Mortensen

– Men taka foreldur av einihvørji orsøk ikki av einum ansingartilboði, verður barnið ikki flutt afturum á bíðilistanum, leggur hann afturat.

Býráðið skuldi viðgera málið í gjárkvøldið, men úrslitið var ikki geitt, tá ið blaðið fór til prentingar.

– Nú skulu foreldur ongnatíð ivast í, hvar á bíðilistanum barn teirra stendur at sleppa í barnaansing í Havn. Nýggjar reglar skulu nú setast í verk.

Myndin er tilvildarlig

Mentamálastýrið stingur lærarar í ryggin

– Vit eru ógvuliga klókk og ófatiliga vónbrotin av okkara arbeiðsgevara. Mentamálastýrið hevur valt at brúka orkuna uppá at fáa prógvtøkuuppgávur gjørdar heldur enn at loysa málið. Tað er átaluvert og eigur at geva teimum, sum hava gjørt uppgávurnar, ringan smakk í munnin, sigur Emmy S. Joensen, næstforkvinna í Føroya Lærarafelag

BLOKADAN
Turið Kjølbro

Næmingarnir í 9. og 10. flokkunum kring landið sleppa kortini upp til fráfaringarroynd fólkaskúlans og viðkaðu fráfaringarroynd fólkaskúlans

Mynd: Jens Kr. Vang

Eftir øllum at døma er blokadan, sum Føroya Lærarafelag setti í verk seinasta heyst móti allari prógvtøkuuppgávugerð til skrivligu royndirnar í fólkaskúlanum í summar, tileinkisgjørd av Mentamálastýrinum. Mikudagin segði Óli Holm, landsstýrismaður við skúlamálum, frá tingsins ráðarapalli í svari til ófráboðanan fyrispurning frá Katrin Dahl Jakobsen, tingkvinnu, at uppgávurnar eru gjørdar og prógvtøkurnar verða sum ætlað. Hvør hevur gjørt uppgávurnar, vil hann einki siga um.

Hetta kemur sera illa við hjá Føroya Lærarafelag.

– Tað er sera harmiligt, at fólk hava átikið sær at gjørt arbeiði, sum er rakt av blokadu. Vit eru ógvuliga klókk og ófatiliga vónbrotin av okkara arbeiðsgevara. Vit taka málið í stórum álvara. Slík atgerð er við til at máa støðið undan fakfelagsarbeiði og tí samanhaldi, sum eigur at eyðkenna fakfelagsarbeiði.

Víst á loysnir

At tað hevur eydnast Mentamálastýrinum at yvirtala fólk at gera prógvtøkuuppgávur, hóast ein Mentamálastýrið hevur valt at brúka orkuna uppá at fáa prógvtøkuuppgávur gjørdar heldur enn at loysa málið, og tað eigur at geva teimum og fólkunum, sum hava gjørt uppgávurnar, ringan smakk í munnin. Tað er átaluvert, uttan mun til, um tað eru lærarar ella onnur sum hava gjørt uppgávurnar. Hesi eru vard av eini lóg, men nú er vandi fyri, at lærarar fara at gita, hvør hevur gjørt tær og ikki, og tað er sera óheppið, sigur Emmy S. Joensen, næstforkvinna í Føroya Lærarafelag.

– Við hesi atgerðini hevur Mentamálastýrið loyst akuttu trupulleikarnar, men vit eru ongantíð so langt frá eini loysn sum nú, sigur Emmy S. Joensen, næstforkvinna í Føroya Lærarafelag

Mentamálastýrið hevur valt at brúka orkuna uppá at fáa prógvtøkuuppgávur gjørdar heldur enn at loysa málið, og tað eigur at geva teimum og fólkunum, sum hava gjørt uppgávurnar, ringan smakk í munnin. Tað er átaluvert og eigur at geva teimum, sum hava gjørt uppgávurnar, ringan smakk í munnin, sigur Emmy S. Joensen, næstforkvinna í Føroya Lærarafelag.

Hon vísir á, at nógvir møguleikar eru at loysa málið.

– Við hesi atgerðini hevur Mentamálastýrið loyst akuttu trupulleikarnar, men vit eru ongantíð so langt frá eini loysn sum nú. Mentamálastýrið setur seg nú aftur á og staðfestir, at hvørki kommunur ella Fíggjarmálastýrið eru til at tosa við um hesi viðurskifti. Okkara arbeiðsgevari kastar alla ábyrgd frá sær, og tað eigur ongantíð at koma fyri. Vit hava ikki sæð enn, at allir partar í trætuni brúka neyðugu orkuna til at loysa trupulleikan.

Føroya Lærarafelag arbeiðir út frá einum áliti, sum Mentamálastýrið, Føroya Lærarafelag og umboð fyri kommunurnar í felag hava gjørt um ábyrgd av savnsrøktini.

– Tilmælið í álitinum vísir, hvussu savnsrøktin kann avgreiðast, og Mentamálastýrið eigur at ábyrgdast fyri hetta, tá ið ein semja eftir samráðingar staðfestir, at loysnir skulu finnast, og allir partar eru við. Tað ber ikki til hálvt annað ár eftir at siga, at Mentamálastýrið einki meinti við álitinum. At so skúlin dettur niður ímillum tvey stýri og blokada er í gildi, sigur nógv um, hvønn arbeiðshátt, Mentamálastýrið nýtir, sigur Emmy S. Joensen.

– Í staðin fyri at brúka alla orkuna til at finna eina virðiliga loysn á trætuni, hevur okkara arbeiðsgevari valt ta vánaligastu loysnina. Føroya Lærarafelag hevur víst á fleiri gongdar leiðis soleiðis at málið kann loysast, blokadan kann takast av og lærarar sleppa at gera uppgávur til royndirnar.

Hon vísir á, at nógvir møguleikar eru at loysa málið.

– Við hesi atgerðini hevur Mentamálastýrið loyst akuttu trupulleikarnar, men vit eru ongantíð so langt frá eini loysn sum nú. Mentamálastýrið setur seg nú aftur á og staðfestir, at hvørki kommunur ella Fíggjarmálastýrið eru til at tosa við um hesi viðurskifti. Okkara arbeiðsgevari kastar alla ábyrgd frá sær, og tað eigur ongantíð at koma fyri. Vit hava ikki sæð enn, at allir partar í trætuni brúka neyðugu orkuna til at loysa trupulleikan.

Føroya Lærarafelag arbeiðir út frá einum áliti, sum Mentamálastýrið, Føroya Lærarafelag og umboð fyri kommunurnar í felag hava gjørt um ábyrgd av savnsrøktini.

– Tilmælið í álitinum vísir, hvussu savnsrøktin kann avgreiðast, og Mentamálastýrið eigur at ábyrgdast fyri hetta, tá ið ein semja eftir samráðingar staðfestir, at loysnir skulu finnast, og allir partar eru við. Tað ber ikki til hálvt annað ár eftir at siga, at Mentamálastýrið einki meinti við álitinum. At so skúlin dettur niður ímillum tvey stýri og hvørki vil kennast við málið, er ein stórur trupulleiki.

Spurd um ikki Føroya Lærarafelag hevur tikið næmingarnar í framhaldsdeildini sum gíslar í málinum og um tað ikki er uppgávan hjá Mentamálastýrinum at siggja til, at næmingar sleppa upp til royndar, svarar Emmy S. Joensen.

– Eg skilji væl, at Mentamálastýrið hevur ein álvarsaman trupulleika at loysa, men Føroya Lærarafelag vil eisini, at næmingarnir sleppa til royndar og vit hava lagt stóra orku í at loysa málið. Vit hava víst á nógvar gongdar leiðir, sum allar eru afturvístar. Mentamálastýrið, Fíggjarmálastýrið og kommunurnar hava ábyrgdina av, at málið ikki er loyst.

Blokadan stendur framvegis við, og hon hevur síðani 20. februar eisini umfatað savnsrøktina á skúlunum kring landið. Tað merkir, at lærarar, sum áður hava rókt og viðlíkahildið serstovur, ikki skulu gera hetta arbeiðið. Um blokadan verður herd upp aftur meir, er støða ikki tikin til enn.

Jógvan E. Ósá

Hav álit á mentunarálitinum

Nú kom so endiliga mentunarálitið. Onkur heldur, at tað kom heldur seint, nú hugsað verður um, at val stendur fyri durum, men nú er tað so komið. Eg – saman við restini av Leikpalli Føroya – hava gjøgnumgingið mentunarálitið væl og virðiliga – og hóast onkrar orðingar ikki vóru heilt sum vit ynsktu, vóru vit á einum máli um, at hetta er eitt stórt framstig. Tað største sum landsstýrið er komið við. At Signar á Brúnni eigur stóran heiður av hesum, kann prógvast, tí beinanvegin hann kom í landsstýrissessin setti hann gongd á arbeiðið og hann sá eisini, at skal m.a. sjónleiki verða lív lagað her á landi, so mátti okkurt gerast og tað skuldi gerast nú.

Tíggju tey fyrstu árini, ið Meginfelag Áhugaleikara Føroya virkaði, var eg í nevndini og var tann fyrsti formaðurin í MáF. Og síðani Leikpallur Føroya varð settur á stovn fyri fleiri árum síðani, havi eg sitið í ráðnum. Tí var eg sera skuffaður at hoyra partamann mín, Jógvan á Lakjuni, í Fimmaranum, har hann líka sum róði fram ímóti, at tað er skeivt at fólk sita og játta pening til sín sjálvan. Hetta hava vit gjørt í nógv ár í Leikpalli Føroya og so væl, at mentunarálitið byggir á hesa skipan og kann ikki sigast annað enn, at hetta er ikki so lítið álit at hava víst okkum.

Í ráðnum sita seks limir. Og fimm av teimum eru vald av MáF – áhugaleiklistini – meðan bert tann eini er valdur av yrkisleikarum. Og hóast hetta, so hevur ongantíð verið nøkur atkvøðugreiðsla í ráðnum, men vit hava altíð kunna tosað okkum fram til eitt úrslit, ið øll eru nøgd við.

Eg vóni ikki, at úttalilsini frá Jógvani á Lakjuni umboða meiningina í Fólkaflokkinum, tí so er hann – Fólkaflokkurin – illa farin – og eg kann sum limir í flokkinum, síðan eg var 16 ára gamal, als ikki góða hetta.

Mentunarálitið vísir okkum álit. Gævi at allir politikarar høvdu gjørt tað sama, eisini Fólkaflokkurin.